# Spula seinastu oljuna upp

Oljuleiðirnar hjá Mærsk í danska partinum av Norðsjónum eru nú gamlar og slitnar, at felagið brúkar meiri enn eina millión tons av vatni til at pumpa 250.000 tunnur av olju upp um dagin. Tað skrivar JydskeVestkysten. Per Angelo, varastjóri í Mærsk Olie og Gas, sigur við blaðið, at í veruleikanum framleiðir felagið meiri vatn enn olju á hesum leiðunum. Hann vísir á, at umleið 350.000 tunnur av vatni koma upp saman við teimum 250.000 tunnunum av olju, og fyri at fáa oljuna upp noyðast teir at spula meiri enn 700.000 tunnur av vatni niður í brunnarnar.



# Styðjar kópaveiði

Slovakiski ES-tingmaðurin Peter Stastny, sum er heimskendur sum fyrrverandi íshockey-spælari, er ímóti, at ES skal gevast at innflyta úrdráttir úr kópi úr Grønlandi og Kanada. Í einari grein í franska blaðnum Le Nuveliste skrivar hann, at tað er púra burturvið at banna úrdráttum úr kópi, tí eitt tílíkt bann rakar vanligar veiðimenn, sum arbeiða nógv fyri at fáa til lívsins uppihald. Tann nú 52 ára gamli Peter Stastny spældi í mong ár íshockey í Kanada og á kekkoslovakiska landsliðnum.

*»At hitta sterku, erligu og fantastisku føroysku kvinnurnar, fekk meg á eitt vegamót.«*

*Benja Stig Fagerdal*



*Benja Stig Fagerland hevur fingið sær ein nýggjan »vinnarasang«. Tað er »Oh my lady« hjá Lenu Andersen, sum hon hoyrdi á Hotel Føroyum 8.mars í fjør*

meira at kalla ein intelektuel missión, sum við at víðka heilan hjá báðum kynum, fær fólk at hugsa um tilfeingi, heldur enn slag av fólki, sigur Benja Stig Fagerland.

- Tað snýr seg um at víðka sjónarringin, og spyrja við seg sjálvan, hvat havi eg brúk fyri av arbeiðsmegi, hvat skal viðkomandi duga. Verða hesir spurningar settir uttanum kynsspurningin, fáa vit fleiri konufólk í millumleiðslur, leiðslur og nevndir, tí vit eru sjálvsagt líka væl kvalifiseraðar og ofta betri enn teir, sum sita har frammanundan, sigur hon.

Og kynsspurningurin kann darva framgongdini hjá einum virki, sigur Benja.

- Vit mugu burtur frá at hugsa kyn, etniskan uppruna ella fyri so vítt aldur. Alt hetta má setast til viks, fyri at vit kunnu koma fram til tað, sum vit veruliga vilja í vinnulívinum: Nevniliga framburð, sigur hon.

- Og tað krevur at serliga teir gomlu gubbarnir við tíggjutiltólvnevndarsessum ella fleiri, byrja at hugsa øðrvísi, og lova øðrum fram-at, leggur hon afturat.

## Skal loysa seg

Til tiltakið í Føroyum í fjør, tosaði Benja Stig Fagerdal til pengapungin hjá makthavarunum og leiðarunum. Hon vísti á, at ein stjóri ella eigari av einari fyritøku ikki skal seta eina kvinnu í starv, uttan at tað loysir eg. Men so legði hon afturat, at tað var ein rættiliga stórur kjansur fyri, at tað fór at loysa seg at velja eina kvinnu.

- Skjótasti mátin at fáa fleiri kvinnur upp í leiðslur og nevndir í vinnulívinum er um fyritøkan fær jalig úrslit av hesum. Female Future verkætlanin í Norra vísti nærum beinanvegin, at fyritøkurnar fingu fíggjarligan fyrimun av at leita eftir kvinnuligum leiðarum, og tað var tað sum skuldi til, fyri at verkætlanin skuldi hava ein kjans, sigur Benja Stig Fagerland

## Forelskað í Føroyum

Tá Benja Stig Fagerland vitjaði í Føroyum í fjør, hevði hon arbeitt hart í nógv ár. Hon koyrdi eitt sindur upp á rutinuna, og sjálvt um boðskapurin var greiður, var hann eitt sindur merktur av, at orðini blivu søgd fyri 117.ferð.

Men í Føroyum hendi nakað, sum hon síðani hevur brúkt nógva tíð upp á at fortelja Gud og hvørjari kvinnu. Hon fekk fulla hugin til arbeiði sítt aftur. Sjálv sigur hon soleiðis um tað sum hendi í einum brævi til blaðið "Kvinna":

- At hitta sterku, erligu og fantastisku føroysku kvinnurnar, fekk meg á eitt vegamót. Eftir tiltakið fann eg útav, at "hetta" er mín lívsleið: At arbeiða við at fáa kvinnur fram – at hjálpa teimum at røkka sínum dreymum. Hetta er mín dreymur og mítt val.

Seinasta árið er tað so at siga ikki komið fyri, at Benja Stig Fagerland hevur gjørt samrøður við fjølmiðlar – bæði norskar og útlendskar - at hon ikki hevur nevnt Føroyar, og hon hevur enntá fingið sær ein nýggjan "vinnarasang". Tað er "Oh my lady" hjá Lenu Andersen, sum hon hoyrdi á Hotel Føroyum 8. mars í fjør.

# Læra at fara á ráðstevnu



*Tað er eydnast at fáa Mikael Jannson, serfrøðing í marknaðarføring og serliga í stevnuluttøku, at koma til Føroya at halda skeið fyri útflytarum tann 25. februar*

**Føroysk luttøka á messum er ikki nakað nýtt, men tað at mann kann læra at vera meira virkin og fáa meira burturúr á slíkari, er kanska ikki nakað, sum øll vita. Tann 25.februar skipar Samvit tí fyri skeiði fyri fólki, sum vilja hava tað besta burturúr at luttaka á messum. Fyrilestrarhaldari er sviin Mikael Jansson, sum verður mettur at vera ein "guru" á sínum øki**

ÚTFLUTNINGUR
*Leif Láadal*

Tað verður javnan sagt, at føroyingar eru smædnari enn eitt nú danir. Hetta gevur at bíta, tá føroyingar luttaka á ráðstevnum ella messum uttanlands. Har danin kanska er um at detta um sínar egnu føtur fyri at sleppa framat einum møguligum kunda, standa summir føroyingar - um ikki hendur í lumma, so í hvussu so er eitt sindur meira friðarliga og bíða til kundin ger vart við seg.

Men hvussu eigur ein stevnuluttakari at gera fyri at fáa mest burturúr. Tað er ein spurningur, sum ber til at svara, og ein av teimum, sum hevur nøkur góð boð upp á optimala stevnuluttøku, er sviin Mikael Jansson, sum er á veg til Føroya.

## Áðrenn, meðan og eftir

Mikael Jannson hevur verið ein av virknastu fyrilestrarhaldarum um stevnuluttøku seinastu 20 árini. Hann arbeiðir m.a. fyri Mässguru (www.massguru.se), ið hevur ráðgivið so at siga øllum teimum størstu útflutningsfyritøkunum í Norðurevropa. Eisini hevur hann fyri stuttum útgivið bókina "The Exhibition Guru", sum er blivin metseljandi.

Kjarnin í framsýningarvísindini er m.a. "TFI", sum stendur fyri Trade Fair Intelligence. Mikael Jansson og tey fólk, sum hann arbeiðir saman við, hava í miðal skeið fyri ikki minni enn 4000 fólkum árliga, og har fáa tey millum annað at vita, at luttøka á einari messu ella ráðstevnu ikki bara snýr seg um tann dagin ella teir dagarnar stevnan er.

Tey flestu vita, at luttøka á ráðstevnu skal fyrireikast. Básur skal bíleggjast, hotel, flutningur o.s.fr. Men fyri at fáa sum best burturúr, skal ein heildarskrá fyri alla luttøkuna gerast. Avtalur við kundar og leverandørar mugu fáast upp á pláss áðrenn farið verður avstað, tí tá hurðarnar lata upp og túsundtals fólk streyma inn, er ikki serliga góð tíð til slíkt.

Á stevnuni sjálvari er nógv, sum kann gerast fyri at fáa sum mest burturúr, og øllum hesum fer Mikael Jannson at greiða frá á skeiðinum í Norðurlandahúsinum tann 25.februar, eins og hann fer at siga luttakarunum um týdningin av at fylgja upp uppá eina ráðstevnu.

## Hugburður

Ein av leiðarunum hjá Kaffi-handilsketuni Starbucks hevur einaferð sagt, at Starbucks er ikki í kaffivinnu og skeinkir fyri menniskjum, men í menniskjavinnuni og skeinkir kaffi.

Hesi orð verða eisini brúkt av fólkunum aftanfyri Mässguru, og mennaskjaliga tilgongdin, tá tað snýr seg um stevnuluttøku, fer at fylla nógv, tá Mikael Jannson fer at siga frá á skeiðinum tann 25.februar.

Skeiðið varir bert fimm tímar, tí sum Durita í Grótinum, samskipari hjá Samviti, sigur, so talar skeiðið til fólk, sum hava nógv um oyrini frammanundan, og tí hava fyriskiparanir valt at hava tað so intensivt sum gjørligt.

Av tí at Vinnuframagrunnurin stuðlar tiltakinum, er skeiðið rættiliga bíligt fyri tey luttakandi. Við ábiti, kaffi og einum eintaki av nýggju bókini hjá Mikael Jannson, kostar tað 500,- krónir fyri hvønn luttakara.

## Fakta

Samvit skipar fyri skeiði í stevnuluttøku í Norðurlandahúsinum 25. februar. Av spennandi stevnum ella messum, sum verða komandi tíðina, kunnu nevnast ESE (Fiskivinnumessa) í Brússel 28-30 apríl, ONS (Oljuráðstevna) í Aberdeen í august og VIGO (Fiskivinnutøkni) í Spania í september, umframt at tað eru ferðavinnuráðstevnur ymsastaðni alla tíðina.